**Eysturoyar Røktar- og ellisheim**
**620 Runavík**

Søkt verður eftir

- sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum/sjúkrahjálparum
- heilsuhjálparum

at byrja 15. september 2006 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðsbrøkur 0.70 tíð.

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Vit kunna bjóða tær eitt arbeiðsumhvørvi, har virðing fyri tí einastaka er í hásæti og har møguleikin í stóran mun er fyri, at fáa tillagað tíni arbeiðsynski.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi sáttmálar.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðumannin á tlf. 478200 ella 478208.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Eysturoyar Røktar- og ellisheim**
Att.: Fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

Umsóknarfreist 10. september 2006.



# HALLÓ!!!

**NÚ BYRJA VIT AFTUR AT DANSA LINEDANCE Í GLÆMUNI Í KVÍVÍK**

Ætlanain er at hava eitt skeið fyri byrjarar mánakvøld frá kl. 19.00-20.30 og eitt skeið fyri royndar dansarar frá kl. 21.00-22.30.

Tilmelding á 221262 og 227701.

Skeiðið er 8 mánakvøld og kostar kr. 350,- og byrjar 4. september.

**BYGDARFELAGIÐ GLÆMAN**

## Skeið á Fróðskaparsetri Føroya 2006-2007

# Próvskeið í enskum

a) Skeið til Cambridge First Certificate in English
byrjar í *Ovastovu í Nóatúni 19*. oktober í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.

- Fortreytir: 10. floks støði ella samsvarandi kunnleiki, ávísur førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English í *Ovastovu í Nóatúni* 18. oktober í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
- Fortreytir: Staðið »Advanced English«, málsligt students-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2007.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **29. september 2006**. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

**Tilmeldingargjaldið er 650 kr.**

Fyri próvtøku í First Certificate in English gjalda næmingar 800 kr. og fyri próvtøku í Certificate of Proficiency in English 1.000 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

# Gjáarlon søkir námsfrøðing og hjálparfólk

Søkt verður eftir námsfrøðingi og hjálparfólki til dagstovnin Gjáarlon í Vestmanna at byrja 1. oktober 2006.

**Vit sóknast eftir**
- 1 námsfrøðingi 40 tímar um vikuna.
  Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.
- 1 hjálparfólk 20 tímar um vikuna.

Dagstovnurin er í 5 eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.

Stovnurin letur upp kl. 7.15 og letur aftur kl. 17.15. Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti.

Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan– og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerandisdagurin er somu-leiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðiliga arbeiði. Vit vænta, at tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 470134/230134 ella Marin í Niðristovu Durhuus, varaleiðara, á telefon 470138/230138.

Umsókn og freist
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. september, kl. 12.00.

Setanarsamrøður verða í viku 37.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

**Gjáarlon**
Hornavegur 16
FO – 350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast »Gjáarlon«.

Lesið Sosialin -so eru tit við!